**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 06. okt. 2011**

Møtt: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels O. Eyvindsson,
Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um stuðul við keyp av fløgu.** | Til 1:<br>Samtykt varð ikki at stuðla hesum. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um stuðul til verkætlanina "Suðringur 2012".** | Til 2:<br>Samtykt varð at stuðla við kr. 25.000,-. |
| **Mál 3:**<br>**Umsókn um byggiloyvi við garð matr. nr. 11d í Hvalba.** | Til 3:<br>Samtykt varð at geva byggiloyvi út frá givnum upplýsingum. |
| **Mál 4:**<br>**Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 472 og 458 í Sandvík.** | Til 4:<br>Samtykt varð at viðmæla umsóknini. |
| **Mál 5:**<br>**Skriv viðv. arbeiðshúsi til kirkjugarðin.** | Til 5:<br>Samtykt varð at koyra málið í Teknisku nevnd, ið kannar umstøðurnar nærri. |
| **Mál 6:**<br>**Skriv frá Herdis Jensen og Niels J. Thomsen um bygningarnar á Hamranesi.** | Til 6:<br>Samtykt at rykkja løgfrøðingin eftir svari viðv. leigumálinum. Harumframt at fáa eina virðis-meting aftrat gjørda. |
| **Mál 7:**<br>**Umsókn um gravi- og byggiloyvi til vinnu-bygn. á matr. nr. 182e í Hvalba.** | Til 7:<br>Samtykt varð, at Tekniska nevnd skal taka ein fund við "Felagið undir stovnan" áðrenn endaligt svar verður givið. |
| **Mál 8:**<br>**Umsókn um byggiloyvi til frítíðarhús uttangarðs á matr. nr. 527.** | Til 8:<br>Samtykt varð at geva byggiloyvi út frá givnum upplýsingum og tekningum. |

| | |
|---|---|
| **Mál 9:**<br>**Vetrarfriðing í Hvalbiar sókn - innkomnar undirskrivtir frá 106 borgarum.** | Til 9:<br>Samtykt varð at takka fyri undirskrivtirnar og boða frá, at Hvalbiar Kommuna hevur samtykt at arbeiða víðari við málinum. |
| **Mál 10:**<br>**Skriv frá Hvalbiar skúla um serligt skúlaborð.** | Til 10:<br>Samtykt varð at geva loyvi at keypa serligt borð. |
| **Mál 11:**<br>**Skriv frá borgara - vegurin matr. 117a/118c.** | Til 11:<br>Samtykt varð, at Otto West tosar við eigaran og at farið verður á staðið at kanna málið nærri. |
| **Mál 12:**<br>**Ikki alment mál.** | Til 12: |
| **Mál 13:**<br>**Ikki alment mál** | Til 13: |